# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar

16. juni fingu Rebekka Danielsen, Argjum, og Regin Skarðhamar, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3200 gr.

18. juni fingu Amalia og Jan Olsen, Viðareiði, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3400 gr.

19. juni fingu Elinborg Mortensen, Tórshavn, og Niklas Samuelsen, Kollafirði, búsitandi í Valby, eina dóttir. Hon vigaði 3750 gr og var 53 cm long.

25. juni fingu Birita Bisp,Argjum, og Jógvan Arnfinn Jacobsen, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 3900 gr.

25. juni fingu Martha Thomassen og Birgir Lauritsen, Sørvági, eina dóttur. Hon var 45 cm long og vigaði 2045 gr.

25. juni fingu Elisabeth M. Johannesen og Hans Magni Davidsen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3050 gr.

26. juni fingu Karin Andreasen og Bogi í Dali, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4910 gr.

27. juni fingu Bergfríð Højsted, Sandi, og Kristian Thomsen, Skopun, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3700 gr.

28. juni fingu Jóna og Atli Rygshamar, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3500 gr.

29. juni fingu Beinta Eliasen og Høskuldur Einar Pálsson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2690 gr.

30. juni fingu Eyðbjørg og Jóan Hendrik Garðshorn, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4200 gr.

1. juli fingu Petra og Birgir Lützen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3600 gr.

## Andlát

25. juni
Poul Streymoy, Vestmanna, 94 ár
26. juni
Ketty Hovgaard, Porkeri, 63 ár
28. juni
Mona í Pálshúsi, Eiði, búsitandi í Keypmannahavn, 91 ár.
1. juli
Elnar Thomsen, ættaður úr Sumba, búsitandi í Hedehusene, 67 ár
Hanna við Høgadalsá, 87 ár.

## Dagurin

**3. juli. Kornelius**. Mong eru halgimenni, sum bera navnið Kornelius, men teir vita ikki við vissu, hvør hesin er. Summir halda, at talan er um pávan Kornelius, sum varð tikin av døgum ár 253. Aðrir siga, at sipað verður til høvuðsmannin Kornelius, sum var fyrsti heidningur, ið var doyptur. Ápostlasøgan kap. 10.

Navnið er latínskt ið kemur av orðinum *cornu*, ið merkir *horn*.

**4. juli. Ulrikus**, deyður í 973. Hann var biskupur í Augsburg í 50 ár, og fyri mongu góðu gerðir sínar varð hann skírdur halgimenni í 993. Hann var annars fyrsta vesturevropeiska halgimenni, sum pávin skírdi.

Týskt navn. *Ul* kemur av *uodal*, ið er sama orð sum okkara *óðal*, rikus merkir *eyður*.

**5. juli. Anshelmus**. Tað er allarhelst navnið á tí tiltikna guðfrøðinginum og erkabiskupinum í Canterbury, sum doyði í 1109.

Kiwanis-Tórshavn / Kiwanis-Rósan :

# 60.000 krónur til børn við krabbameini

Hósdagin 1. juli handaði Kiwanis felagskapurin í Føroyum tveir gávukekkar upp á tilsamans 60.000 krónur til foreldrabólkin at børnum við krabbameini, sum hoyrir undir Føroya Felag móti Krabbameini.

Peningurin er ein stuðul til luttøkugjaldið hjá teimum til eitt tiltak saman við "kanserramte børn", sum verður í Danmark í september 2004.

Fyri Kiwanis-Tórshavn handaði formaðurin, Øssur av Steinum, ein gávukekk upp á 44.000 krónur, og fyri Kiwanis-Rósuna handaði forkvinnan, Anna Østerø, ein gávukekk upp á 16.000 krónur.

Handanin fór fram í hølunum hjá Krabbameinsfelagnum.

Endamálið hjá Kiwanis felagskapinum er at hjálpa – fyrst og fremst børnum.




*Anna Østerø, forkvinna í Kiwanis-Rósuni, Rani Jónsson Rubeksen og Elisabeth Kristina Mohr Vang, frá foreldrabólkinum at børnum við krabbameini, sum hoyrir undir Føroya Felag móti krabbameini, og Øssur av Steinum, formaður í Kiwanis-Tórshavn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Yvir 40 ár síðan seinast

Tá Torgerð í 1963 fór til Amerika, mundi mamma hennara ikki rokna við, at tað skuldu ganga heili 41 ár, til hon aftur kundi verða saman við øllum 7 børnum sínum.

Rosa og Sørin Petersen í Klaksvík fingu 7 børn, 3 gentur og 4 dreingir. Allar tríggjar døturnar búsettu seg í Amerika, og yngsti sonurin býr í Danmark.

Teir tríggir synirnir, ið eru eftir í Føroyum, búgva allir á Viðareiði.

Tað er langt at ferðast úr Amerika, og tað er ikki nakað, tú gert á hvørjum degi, men Rosa hevur verið har yviri og vitjað døturnar.

Torgerð var tann fyrsta, sum fór til Amerika, og tað endaði við, at allar tríggar systrarnar búsettu seg har yviri.

Fyrstu ferð, Rosa fór yvir, segði maður hennara skemtandi, at hann visti ikki, um hann tordi at lata hana fara. Tað vísti seg jú, at eingin av konufólkunum, sum fóru, komu aftur í aftur.

Í 1963 fór Torgerð til Amerika, og 2 ár seinni fór Jastrid eisini avstað, og tað endaði við, at allar tríggjar døturnar búsettu seg í Amerika.

Men í juni hevði Rosa ta stóru gleði, at øll børnini kundu verða heima í senn.

Rosa eigur 18 ommubørn og 17 langommubørn.

Maður Rosu doyði í 1988.



*Rosa Petersen í Klaksvík saman við øllum 7 børnum sínum. Tað eru 41 ár, síðani fyrsta dóttirin fór til Amerika, og er hetta fyrstu ferð, at tey eru saman aftur øll í senn.*

*Frá vinstru: Jóanes, Róland, Torgerð, Petur, Malan, Jastrid, Jákup og Rosa*

*Mynd: Olivur Joensen*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Judith Lydersen 70 ár



Í morgin fyllir Judith Lydersen í Klaksvík 70 ár.

Judith er dóttir Louisu Lamhauge úr Lamba og Jens Hansen í Glasstovuni í Árnafirði. Í 1956 giftist hon við Óla Lydersen í Klaksvík, og eiga tey børnini, Jógvan, sum er giftur við Ninnu og býr á Argjum, Lovisu, sum er gift við Jón og býr á Oyrarbakka og Jens, sum er giftur við Ann og býr í Miðvági.

Hon eigur 7 ommubørn, og tey eita, Bogi, Judith, Óli, Leivur, Jonn, Magnus og Høgni.

Judith hevur fyri tað mesta verið tað, vit rópa heimagangandi, og er tað serstakliga hugnaligt at koma á gátt í heimi teirra á Stongunum.

Seinnu árini hevur hon vaskað á Bedingini, og í mong ár hevur hon verið virkin í eldrafelganum Hugna, har hon eisini er nevndarlimur og skrivari.

Judith og Óli ganga trúføst í kirkju og á møti í samkomuni Emmaus.

Føðingardagurin verður hildin hjá dótrini á Oyrarbakka.




# Óli Hammer 60 ár

Sunnudagin 4. juli fyllir ein av okkara kendu vinnulívsmonnum, Óli Hammer í Havn, 60 ár. Hann er sonur Hendrik Hammer úr Kinn í Oyndarfirði og Jonu, f. Joensen við Norðskála. Óli varð føddur í Oyndarfirði, har foreldrini búðu tá. Tey fluttu til Havnar, meðan Óli var smádrongur.



Óli er útbúgvin skipsførari og sigldi í nøkur ár úti í verðini hjá reiðarínum ØK. Heimafturkomin gjørdist hann stýrimaður á Dagstjørnuni, sum hoyrdi undir Strandferðsluna tá og síðani undir Vaktar- & Bjargingartænastuna.

Tá Smyril kom til landið í 1975 var ein dani, Mecklenburg nevndur, skipari teir fyrstu mánaðirnar. Hann hevði verið skipari frammanundan á Morten Mols, sum skipið æt í Danmark. Stýrimenn vóru Alfred Jacobsen úr Hósvík og Óli Hammer. Tá Mecklenburg fór aftur til Danmarkar, vórðu báðir stýrimenninir settir í starv sum skiparar.

Umframt at sigla innanoyggja millum Suðuroynna og Havnina og ta fyrstu tíðina eisini til Klaksvíkar, sigldi Smyril uttanlands um summarið til Íslands, Skotlands, Noregs og seinni eisini til Hanstholm í Danmark.

Óli Hammer og Alfred Jacobsen vóru skiparar hesi árini. Í 1983 gjørdi Landsstýrið av, at uttanlandssiglingin skuldi á privatar hendur. Óli Hammer var tá stigtakari til at stovna Pf. Smyril Line, sum keypti svensku ferguna Gustav Vasa. Liðugt umbygd kostaði hon 130 mió.kr, so tað var eitt stórt tak. Fergan, sum var nógv størri og í allar mátar betri enn Smyril, fekk navnið Norrøna og yvirtók rutuna hjá Smyrli. Í fyrstani vóru nakrir fíggjarligir trupulleikar, men felagið megnaði at koma burtur úr teimum og at halda fram við siglingini.

Uppaftur eitt megnartak varð tikið, tá nýggja Norrøna varð bygd fyri útivið 700 mió.kr - størsta einstaka tiltak í føroyskari vinnulívssøgu. Aftur hesaferð var Óli Hammer primus motor. Nýggja Norrøna, sum kom til landið í fjør summar, hevur eisini havt nakrar fíggjarligar trupulleikar. Sum ein rættur vinnulívsmaður hevur Óli gott mót og fellur ikki í fátt. Vónandi - og væntandi - verður vunnið á hesum trupulleikunum eisini.

Óli er giftur við Marthu Weihe av Selatrað, og tey búgva við Marknagilsvegin í Havn. Tey eiga børnini Hendrik, Annu og Boga. Hendrik er skipari á Norrønu, og Bogi gongur á sjómansskúla. Martha og Óli eiga 5 ommu- og abbabørn.

Føðingardagin er Óli burturstaddur saman við sínum nærmastu.

Hjartaliga tillukku, Óli!

**Ása og Finnbogi**

## Tøkk

Vit vilja við hesum hjartaliga takka øllum tykkum, sum sýndu okkum samkenslu, tá ið kæra kona, mamma og vermamma okkara

**Olga Reinert**
Tórshavn

doyði og varð jarðað.

Takk til Sverra Steinhólm prest fyri troyst og umsorgan.
Takk til Sonju Klein prest fyri troystarrík orð, og takk til kórsangarar fyri vakran sang í kirkjuni og á grøvini.
Takk til lærarar, foreldur og floksfelagar í Hoyvíkar Skúla, og takk til starvsfelagar og leiðslu í Keypssamtøkuni fyri góðan og hjartaligan stuðul.
Eisini takka vit øllum tykkum, sum hugsaðu um okkum, ringdu og vitjaðu inn á gólvið.
Takk fyri blómur, kransar og gávur.
Takk til tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðini og ervinum, og øllum tykkum, sum fylgdu Olgu til gravar.
Hjartaliga takk fyri øll somul.

*Familjunnar vegna*

**Johnny, Høgni, Bjørn og Rógvi**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymsan hátt sýndu okkum samkenslu, tá ið okkara kæri bróðir, mammu- og pápabeiggi og ommu- og abbabeiggi

**Sigvald Hentze**
Hvalba

fall í Norðbergi tann 1. mai 2004.

Serstøk tøkk til tykkum øll, ið hava leitað bæði á sjógvi og landi.

Eisini ein stór tøkk til Ólav Rasmussen, prest, fyri stuðul og sera vøkur orð á minningarhaldinum. Jens Mortani Mortensen og Brandi Enni takka vit hjartaliga fyri tann hátíðarliga dám, ið spæl tykkara setti á minningarhaldið.

Ein hjartans tøkk til øll tykkum, sum stílaðu fyri og á annan hátt hjálptu til við ervinum.

At enda vitlja vit takka tí stóru fjøld og Hvalbiarbygd, sum á minningarhaldinum vístu Sigvaldi seinasta heiðurin.

*Vegna familjuna*

**Johild og Hermund**

## Diamantbrúdleyp

Í dag, 3. juni, hava Marianna og Hans Olsen, Oyrarbakka, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin hjá Tóru og Magnus við Norðskála frá kl. 18.00.

## Brúdleyp

Í dag, 3. juli, kl. 14.00 giftast í býráðshúsinum í Klaksvík Heidi Neshamar, Tórshavn, og Jógvan Kristin Olsen, Klaksvík. Dagurin verður hildin heima, Undir Grashjalla 9, Klaksvík, frá kl. 17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Í dag, 3. juli, kl. 15.00 giftast í Saksunar kirkju Joan Haraldsen, Sandavági, og Gunnfríður Dahl-Olsen, Saksun. Døgurið verður fyri innbodnum kl. 16.30. Eftir kl. 20.00 er vælkomst heima í Saksun.

Í dag, 3. juli, kl.15.00 giftast í Sjóvar kirkju Petra Weihe og Per Mikkelsen, Strondum. Veitslan verður fyri innbodnum á Svangaskarði kl. 18.00.

## 80 ára føðingardagur

Líggjas Vágslíð verður 80 ár mánadagin tann 5. juli. Dagurin verður hildin tann 4. juli hjá dóttrini Undir Fossum 71 frá kl. 17.00 til kl. 20.00.

## 70 ára føðingardagur

Sunnudagin 4. juli verður Judith Lydersen í Klaksvík 70 ár. Føðingardagurin verður hildin hjá Jón og Lovisu Ellendersen á Oyrarbakka (Fysioterapiin við Streymin) sunnudagin 4. juli frá kl. 17.00. Húsini standa 500 metrar suður frá Shellstøðini. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Konfirmatión

Sunnudagin 4. juli kl. 1.00 verður Dánjal Arge, sonur Dagfinn og Valborg Arge, konfirmeraður í Vesturkirkjuni.

Adr. Janstovugøta 7.

## Prógv

28. juni hevur Nancy Hentze av Argjum lokið prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur á CVSU-Fyn í Svendborg.

Jórun Højgaard av Skarði, Tórshavn, hevur við Danmarks Tekniske Universitet, Lyngby, 28.juni fingið prógv sum evnafrøðisverkfrøðingur.

Tann 18. juni tók Johild Dulavík, sjúkrasystir, prógv sum »Master í pedagogik (voksen uddannelsen)« á Roskilde Universitet.